# Løgtingsval broytir bygnaðin í ÚF

**Leiðslubygnaðurin í Útvarpi Føroya verður nú broyttur orsakað av úrslitinum av seinasta løgtingsvali. Útvarpsstjórin metir tað vera óheppið, at ein løgtingslimur er varastjóri, og hevur tí valt at niðurleggja varastjórastarvið, nú varastjórin varð valdur á ting.**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*



Tá fólk fóru á val í suðurstreymoyar valdømi 30. apríl í ár, vóru tey ikki bert við til at avgera hvør skuldi manna Føroya Løgting komandi yra árini, men eisini hvussu leiðslubygnaðurin í almenna føroyska útvarpsstovninum skuldi síggja út.

Úrslitið av løgtingsvalinum hevur í øllum førum beinleiðis borið bygnaðarbroytingar í Útvarpi Føroya við sær, sum innibera, at varastjórastarvið verður niðurlagt, og programleiðarastarvið verður býtt upp í tveir partar til tveir persónar at røkja.

### Starvsviðurskiftini máttu broytast

Á løgtingsvalinum í vár varð Jógvan Arge, programleiðari og varastjóri í Útvarpi Føroya, uppstillaður og valdur sum fyrsti varamaður á tingi fyri Tjóðveldisflokkin í suðurstreymoy.

Tá samgonga varð skipað millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin, varð fyrst valdi fyri Tjóðveldilokkin í suðurstreymoyar valdømi, Høgni Hoydal, settur sum landsstýrismaður, og harvið gjørdist Jógvan Arge regluligur limur løgtinginum.

Í lógini um samsýning og eftirløn løgtingsmanna verður ásett, at løgtingslimir ikki kunnu røkja meira enn eitt hálvt starv hjá tí almenna. Av hesari orsøk máttu starvsviðurskiftini hjá Jógvan Arge í Útvapi Føroya undir øllum umstøðum broytast

### Programleiðarin er varastjóri

Lógin um samsýning og eftirløn løgtingsmanna ásetur, at ein løgtingslimur hevur rætt til farloyvi úr almenna starvi sínum, men hendan møguleikan hevur leiðslan í Útvarpi Føroya ikki valt at nýta.

Ístaðin hevur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, í samráð við Jógvan Arge, avgjørt at býta programleiðarastarvið upp í tvey hálvtíðarstørv, har Jógvan Arge í framtíðini skal røkja annað, og Jógvan Jespersen skal røkja hitt við síðuna av starvinum sum útvarpsstjóri.

Leiðslubygnaðurin í Útvarpi Føroya ásetur, at programleiðarin eisini er varastjóri. Men Jógvan Jespersen sigur seg meta tað vera óheppið, at ein løgtingsmaður situr um virkandi stjóri fyri ein stovn sum Útvarpi Føroya, soleiðis sum varastjórin ger, tá stjórin er burturstaddur.

Av tí at tað soleiðis verður mett at vera óheppið at Jógvan Arge skal røkja starvið sum varastjóri í Útvarpi Føroya, og hin helvtin av programleiðarafunktiónini, útvarpsstjórin sjálvur, ikki eisini kann røkja starvið sum varastjóri, hevur útvarpsstjórin valt at niðurleggja varastjórafunktiónina.

Útvarp Føroya hevur soleiðis ikki longur nakran varastjóra.

### Hevur verið virkandi stjóri

Hesar seinastu vikurnar hevur Jógvan Arge verið virkandi stjóri fyri Útvarp Føroya, meðan Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri var í feriu.

Jógvan Jespersen, sum í gjár kom aftur til arbeiðis, hevði sum fyrsta punkt á skránni at broyta starvsviðurskiftini hjá Jógvan Arge.

- Vit hava gjørt tað soleiðis programleiðarastarvið verður býtt ímillum útvarpsstjóran og Jógvan Arge, soleiðis at Jógvan Arge heldur fram í hálvum starvi sum programleiðari við ábyrgdini av evnisøkjum, sum ikki beinleiðis koma í samband við politiska arbeiði hansara, sigur Jógvan Jesperse, sum ikki metir, at løgtingsarbeiðið hjá Jógvan Arge kann koma tvørt fyri í tí starvinum, sum hin hálvi programleiðarin í framtíðini fer at røkja.






## Kanska besti bólkur í Skandinaviu

**Ummælarin á dagblaðnum Politiken var ovfarin av framførsluni hjá Clickhaze á Roskildefestivalinum.**

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*

Clickhaze spældi bara eina konsert á Roskildefestivalinum, men so ymisk sum ummælini eru, skuldi ein trúð, at ummælararnir hava hoyrt ymiskar konsertir.

Sum vit skrivaðu leygardagin, varð bólkurin Clickhaze kallaður »et gymnasieband« av ummælaranum á festivalavísini Roskilde Daily, sum lastaði Clickhaze fyri ikki hava format til spæla á Roskildefestivalinum Men samstundis sat ein ummælari á dagblaðnum Politiken og var ovfarin av tí, hann hoyrdi mikudagin á Roskildefestivalinum.

Kanska besti bólkur í Skandinaviu, er skoðsmálið, sum ummælarin Erik Jensen gevur Clickhaze.

Ummælarin samanber Eivør Pálsdóttir við Björk og hevur yvirskriftina »Björk - go home!«.





# Hava fingið treytirnar fyri komandi ár at vita

**Næsta ár sleppa kommununurnar at byggja fyri góðar 160 milliónir tilsamans**

KOMMUNALAR ÚTBYGGINGINAR
*Áki Bertholdsen*

Næsta ár sleppa kommunurnar í Føroyum at byggja út fyri góðar 160 milliónir krónur.

Tað fingu umboðini fyri tey bæði kommunufeløgini at vita á fundi við Landsstýrið fríggjadagin.

Landsstýrið hevði kallað umboð fyri Kommunufelag Føroya og Kommunusamskipan Føroya á fund fríggjadagin at umrøða tær kommunalu útbyggingarnar komandi ár.

– Talan var um ein kunnandi fund. Og tað, vit fingu at vita var, at næsta ár sleppa kommunurnar at byggja fyri áleið somu upphædd sum í ár, tvs einar 160 milliónir, sigur Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag.

Hvussu nógv, hvør einstøk kommuna kann byggja út fyri, verður avgjørt eftir fólkatalinum í henni.

– Men gera kommunurnar í einum ávísum øki avtalu um útbyggingarnar, so at tær læna kvotu ímillum sín, verður loftið hækkað eitt sindur. Somuleiðis sleppa kommurnar at vekta tað størstu einstøku útbyggingina, so at tað bara telur 50 %.

– Tað merkir, at byggir ein kommuna eitt verklag fyri 10 milliónir, telur tað sostatt bara fimm milliónir av kvotuni hjá kommununi. Upprunaliga var upp á tal, at tað skuldi bara vera, har ein kommuna byggir havnalagið út, at útbyggingin ikki skuldi telja fult av kvotuni.

– Men tað eru nógvar kommunur, sum ikki hava stórvegis av havnum, men heldur vilja sleppa at byggja skúlan út. Og fyri at allar kommunurnar skuldu vera javntsettar, vildu vit, at tað skuldi ikki bara vera havnaútbyggingar, sum kundi vektast og tað er gingið á møti.

– Sostatt er tað blivið til, at hvør kommuna kann vekta tað størstu útbyggingina hon ger.

Formaðurin í Kommunufelagnum sigur, at tað eru altíð onkrar smávegis broytingar at gera og Landsstýrið skal nú gera eitt skrivligt upplegg, sum so aftur skal leggjast fyri kommunurnar í heyst, eftir summarferiuna.



*Næsta ár sleppa kommunurnar ikki at byggja út fyri meir, enn tær bygdu út fyri í ár* *(Savnsmynd)*

### Heldur samstarv enn lóg

Annars heldur Jacob Vestergaard, at yvirhøvur hava kommunurnar góðtikið, at loft verður sett fyri, hvussu nógv tær kunnu byggja út fyri.

– Tað er viljin hjá Landsstýrinum at so skal vera og tað fáa vit onki gjørt við.

– Og vit vilja heldur samstarva við Landsstýrið um útbyggingarloftið, heldur enn at tað verður ásett við lóg, tí so missa kommurnar alla ávirkan. Men eina avtalu hava vit møguleika at ávirka.

Annars sigur hann, at fyri allarflestu økini í landinum hevur útbyggingarloftið ikki tann stóra týdningin, tí nógvar kommunur eru so illa fyri fíggjarliga, at tær gera ikki tær útbyggingar, tær hava rætt til, eitt nú kommunurnar í Suðuroy og Sandoy.

– Tað eru bara Tórshavnar kommuna og onkrar einstakar kommunur í miðstaðarøkinum, sum renna seg upp undir loftið.

– Men samstundis hava kommunurnar ført fram, at okkurt má gerast við útbyggingarloftið, so hvørt sum fleiri og fleiri øki verða løgd út til kommunurnar at umsita.

– Tað kann ikki verða so, at landið leggur t.d. eldraøkið út til kommunurnar at umsita, men at útbyggingarloftið aftana verður ein forðing fyri, at eldrasambýli verða bygd.

Jacob Vestergaard sigur, at Landsstýrið hevur váttað, at tað er sinnað at taka tann spurningin upp, so hvørt tað verður ein trupulleiki so at lagt verður upp fyri tí, so hvørt ymisk øki verða løgd út til kommunurnar at umsita.

# Ongin áhugi fyri arbeiði hjá Sumbiar Kommunu

*Nú eru aðrar tíðir: Sumbiar Kommuna bjóðaði herfyri arbeiðið út at innrætta eina høll til kommunu-skrivstovu, men ongin bjóðaði*



**Kommunan bjóðaði arbeiðið út at gera nýggju kommunuskrivstovuna, men hon fekk ikki eitt einasta eitt tilboð**

ÚTBJÓÐING
*Áki Bertholdsen*

**Sumba:** Tað er ikki stórur áhugi hjá handverkarum at átaka sær arbeiði hjá Sumbiar Kommunu.

Fyrr í summar bjóðaði kommunan arbeiðið út at innrætta nýggja kommunuskrivstovu.

Men tá ið avtornaði kom ikki eitt tað einasta tilboð inn.

Kommunan hevur keypt eitt gamalt fiskavirki í Sumba við tí í hyggju at innrætta húsið til kommunuskrivstovu.

Fiskavirkið er ein høll, sum ætlanin var at innrætta til kommunuskrivstovu og talan var um eitt hampiliga fittligt arbeiði.

Í fíggjarætlanini fyri 2002 heví kommunan sett 500.000 krónur settar av til at innrætta húsið fyri og at hampa tað uttan.

Jacob Vestergaard sigur, at tað vóru einir seks, sjey arbeiðstakarar, ið bóðu um útbjóðingartilfar, bæði handverkarar í Suðuroy og onkir einstakir aðrastaðni frá eisini.

– Men tá ið freistin at lata tilboðini inn, var slætt borð, tí ongin læt við seg koma aftur.

Hann veit ikki, hvussu hetta skal skiljast, men hann heldur at hetta var løgið.

– Tað má vera tekin um at tað er ovmikið at gera frammanundan og hendan uppgávan hevur kanska verið ov lítil til at hon hevur verið lokkandi hjá handverkarum í hesum døgum, tá ið nóg mikið er at gera og handverkarar handverkarar helst vilja hava tey stóru arbeiðini.

# Vísir skuldsetingum um vanrøkt frá sær

**Jógvan Adolf Johannesen í Skopun vil ikki hava sitandi á sær, at skúlin í bygdini var so illa fyri í hansara tíð sum fyrstilærari**

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

**Skopun:** Tað kann ikki vera rætt, at Ingun Simonsen skal hava alla æruna fyri at hava gjørt skúlan í Skopun til ein nýmótans skúla.

Jógvan Adolf Johannesen, sum var fyrstilærari í Skopun í 27 ár undan Ingun Simonsen, heldur lítið um, tá ið hon ferð eftir ferð framførir í bløðunum, nógv hon hevur gjørt fyri skúlan og, hvussu aftaliga skúlin var, tá ið hon kom.

– Tá ið eg kom har, var m.a. Niels W. Poulsen har og hann var heldur ikki hvør sum helst.

– Men tá ið Ingun Simonsen ferð eftir ferð førir fram, hvussu illa fyri skúlin í Skopun var, tá ið hon kom til, er hetta samstundis ein skuldseting ímóti okkum, sum undan fóru um at hava vanrøkt skúlan og tað haldi eg ikki er rætt.

Jógvan Adolf Johannesen sigur, at tá ið hann kom, vóru tvær skúlastovur í erva og ein í kjallaranum, men hann fekk so eina skúlastovu afturat. Haraftírat var alt skúlaøkið sprongt út og asfaltera, nýtt skúlalað gjørt, trøð vórðu plantað og alt varð innistikað við høgum stiki.

– Tað, sum er bygt út, síðani hon kom, er at fýrrúmið er flutt út um, so at hon hevur fingið skrivstovu. Tað er eisini rætt at eitt wc er gjørt afturat teimum fýra sum vóru frammanundan. At so tvey vóru oyðiløgd av herverkið, er ein onnur søga.

Jógvan Adolf sigur, at tær broytingar. sum eru gjørdar í skúlanum, er komnar av nýggjum krøvum, sum eru settar skúlunum og krøvini høvdu eisini verið sett í verk í Skopunar Skúla, antin Ingun var lærari ella ikki.



*Jógvan Adolf Johannesen vil ikki hava sitandi á sær, at skúlin í Skopun var vanrøktur ímeðan hann var fyrstilærari*

– Tað haldi eg er nakað nógv avgjørt at taka sær æruna av tí, tí tað vóru krøv uttaneftir sum syrgdu fyri tí. Skúlin broyttist so ómetaliga nógv hesi árini, so nógv av tí gamla var ónýtiligt, samstundis sum teldurnar komu.

– Tað hevur heldur aldrin staðið á at fáa kommununa at fíggja undirvísingartilfar, útgferðir og aðrar útreiðslur til skúlan og tær nýggju bøkur, sum komu, vórðu eisini keyptar

Fyrrverandi fyrstilærarin sigur, at tað kann væl vera, at hesin peningurin stóð á ymsum konti, og at beinleiðis kontan til skúlan var so lá, sum Ingun Simonsen førir fram, men tað stóð so ongantíð á at fáa pening.

Hann sigur, at veruleikin er, at Skúlin í Skopun var so væl útbygur og útgjørdur sum nakar skúli í oynni.

Tí Heldur Jógvan Adolf Johannesen als ikki, at skúlin var forsømdur. Hann kennir heldur onki til, at tað vóru so stórir samstarvstrupulleikar tá, sum ført verður fram.

Eyðvitað vóru vit ikki altíð samd um alt, men tað bar altíð til hjá okkum at tosa okkum til rættis. Men tað tykist at hava knípt við tí seinastu árini.